BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Hósvíkar skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir fyrstalærara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær eitt tíðaravmarkað leiðslustarv í fólkaskúlanum.**

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir fyrstalærara í tíðaravmarkað starv í Hósvíkar skúla frá umleið 25. august 2023 og restina av skúlaárinum 2023/24.

Hósvíkar skúli hevur næmingar í 1. – 3. flokki, og eru 15 næmingar innskrivaðir í skúlan skúlaárið 2023-24. Í skúlanum starvast umframt fyrstalæraran ein námsfrøðingur og ein lærari, báðir í parttíðar starvi.

**Um starvið**
Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Hann skal virka fyri, at næmingar og lærarar trívast, fyri góðum arbeiðsumstøðum, og at gott samstarv er millum skúla og heim og skal virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

Harumframt skal fyrstilærarin vera førur fyri at taka neyðugar avgerðir, at skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja umstøður fyri fakligari menning.

**Førleikakrøv**

- Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum fólkaskúlalærari og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Leiðsluroyndir og skeið innan leiðslu eru ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Hósvíkar skúla. Starvið er flokkað í lønarflokki 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **4. juni 2023.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**: bumr@bumr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking, barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*